RÚSDREKKASØLA LANDSINS

# Ársfrágreiðing
# 2021

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ........ 3
2. Árið ........ 4
    2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð ........ 4
    2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt ........ 4
    2.3 Sølubúðir og tænasta ........ 4
    2.4 Starvsfólkakostnaður ........ 5
    2.5 Árið samanumtikið ........ 5
3. Búskapur ........ 6
    3.1 Umsetningur ........ 6
    3.2 Sølugongdin gjøgnum árið ........ 6
    3.3 Rakstraravlopskravið ........ 6
4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl ........ 7
    4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir ........ 7
    4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar ........ 8
    4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar ........ 9
    4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar ........ 10
    4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva ........ 10
5. Ársroknskapur fyri 2020 ........ 11
    5.1 Rakstrarroknskapur ........ 11
    5.2 Fíggjarstøða ........ 12

# 1. Inngangur

Rúsdrekkasøla Landsins er stovnur undir Føroya landsstýri. Rúsdrekkasølan virkar sambært løgtingslóg nr. 20 frá 10. mars 1992 við seinni broytingum og ásetingum í kunngerð nr. 144 frá 20. oktober 1992 við seinni broytingum.

Rúsdrekkasølan hevur til endamáls at innflyta og selja rúsdrekka. Rúsdrekkasølan hevur einkarætt til innflutning av rúsdrekka og við ávísum avmarkingum og undantøkum eisini einkarætt til sølu av rúsdrekka. Stovnurin skal í so stóran mun sum gjørligt, rekast út frá handilsligum sjónarmiðum, tó við neyðugum atliti til heilsulig sjónarmið.

Rúsdrekkasølan hevur átta handlar kring landið. Teir liggja í: Tórshavn, Klaksvík, Saltangará, Miðvági, Sandi, Trongisvági, Vestmanna og við Norðskála. Handlarnir virka eisini sum fløskumóttøkur. Harumframt er goymsla á Hjalla og fyrisitingin húsast í Tórshavn. Øll hølini eru leigumál.

Rúsdrekkasøla Landsins hevur umleið 34 fólk í føstum starvi. Harafturat eru upp til umleið 32 fólk í tímaløntum starvi.

Í hesi ársfrágreiðing verður tikið samanum árið 2021. Komið verður inn á gongdina í søluni, fíggjarlig viðurskifti og annað, sum hevur merkt árið og raksturin í 2021.

Tórshavn, tann 25. apríl 2022

Rógvi Andrias Fossádal
stjóri

# 2. Árið

## 2.1 Rúsdrekkasølan sum alkohol politiskt stýringsamboð

Síðan einkarsølan Rúsdrekkasøla Landsins (RSL) varð sett á stovn, er ein miðvís broyting í drekkimynstrinum í Føroyum farin fram. Frá í mestan mun at drekka spirtus er drekkimynstrið støðugt broytt til, at tað fyri tað fyrsta verður drukkið minni pr. íbúgva 15 ár og eldri. Ístaðin verður keypt minni av spiritusi og meira vín og øl, sum hevur lægri alkohol styrki. Hetta er at fegnast um, tí tað var júst hetta, sum upprunaliga var málsetningurin við rúsdrekkalógini og einkarsøluni.

Staðfestast kann, at einkarsølan hevur virka væl sum alkohol politiskt stýringsamboð hjá landinum.

Broytingin í drekkimynstrinum hevur tó hinvegin við sær minni inntøku hjá RSL – Og skyldast hetta avgjalds og príspolitikkin. RSL hevur tó áhaldandi arbeitt miðvíst við at tillaga raksturin til hesar broytingarnar í alkoholnýtsluni. Rakstrarkostnaðurin er tó øktur nakað grundað á lønar- og aðrar príshækkingar í samfelagnum.

## 2.2 Rúsdrekkasølan selur alsamt meira veikt

Seinasta uppgerðin vísir at handlarnir hjá Rúsdrekkasøluni selja alsamt meira veikan løg, tí serliga sølan av spiritusi er minkað.

Av øllum vørusløgum vórðu seldir 213.180 litrar innanlands av reinum alkoholi í 2021. Í 2012 vórðu seldir tilsamans 180.926 litrar innanlands av reinum alkoholi.

Tølini vísa, at meira verður selt av víni, meðan minni verður selt av spiritusi. Í 2012 vórðu seldir 51.675 litrar innanlands av reinum alkoholi í víni. Í 2021 var talið 66.961 litrar av reinum alkoholi.

Í 2012 vórðu seldir 73.527 litrar innanlands av reinum alkoholi í spiritusi og í 2021 var talið 75.170 litrar. Hetta svarar til ein vøkstur á 2,22%, samstundis sum fólkatalið í Føroyum í sama tíðarskeiðið er vaksið við áleið fimm túsund fólkum svarndi til 10-11%.

Sølan av øli hevur at kalla óbroytt í mong ár, men hetta er broytt seinastu árini. Í 2012 vórðu seldir 54.300 litrar innanlands av reinum alkoholi í øli. Í 2021 vórðu 69.603 litrar av reinum alkoholi í øli seldir.

Endamálið við Rúsdrekkasøluni var m.a., at hon skuldi virka fyri at tálma nýtsluni. Nýtslan í 1992 var 8,8 litrar av reinum alkoholi fyri hvønn íbúgva 15 ár og eldri. Í 2021 var hon 6,7 litrar.

## 2.3 Sølubúðir og tænasta

Arbeitt hevur eisini verið við at menna landsfyritøkuna – Ynski er, at hon verður á jøvnum føti við fremstu rúsdrekkasølur í norðurlondum og tí er umráðandi, at dentur áhaldandi verður lagdur á at uppfylla tann eftirspurning, sum viðskiftafólk okkara eftirspyrja og ynskja. Arbeitt verður tí javnt og miðvíst við at laga seg til tær broytingar, ið eftirspurningur og viðskiftafólk ynskja.

Í fleiri ár hevur leiðslan eftir fíggjarligum førimuni havt fokus á at dagføra og uppstiga handlarnar kring landið og hetta arbeiðið hevur gingið væl.

Ein nýggj søludeild bleiv latin upp við Norðskála í 2015 og ein í Vestmanna í 2017, umframt hetta vórðu fløskumóttøkurnar á deildunum í Tórshavn, Saltangará, Klaksvík og Miðvági eisini dagførdar í 2017 og 2018, og í 2020 lat Rúsdrekkasøla Landsins upp í nýggjum og rúmligari hølum á í Trongisvági.

Hetta var ein munandi uppstigan í tænastuni til viðskiftafólk okkara.

Rúsdrekkasølan hevur leingi havt ynski um, at uppstiga tænastustøðið og virksemi sítt í høvuðsstanum: Tórshavn/Hoyvík, so vit kunnu veita eina betur tænastu til økta fólkatalið í økinum. Umbønir um, at lata upp fleiri sølubúðir í høvuðsstanum, eru tíverri ikki játtaðar av sitandi landsstýri ella av undanfarna landsstýri.

## 2.4 Starvsfólkakostnaður

Starvsfólkakostnaðurin hækkaði í tíðarskeiðnum 2011-2020 til index 123. Starvsfólkakostnaður umboðar størsta part av rakstrarkostnaðinum í rakstrarroknskapinum, og svaraði hann í 2020 til 11% av umsetninginum.

## 2.5 Árið samanumtikið

Samanumtikið metir leiðslan, at árið eydnaðist væl. Covid-19 hevði tó nógvar avbjóðingar við sær, ið kravdu munandi meira fíggjarliga orku umframt eyka tilfeingi av ymsum slag.

# 3. Búskapur

## 3.1 Umsetningur

Seinastu tíggju árini hevur umsetningurin hjá Rúsdrekkasøluni ligið millum uml. 120 og 159 mió. kr.

Umsetningurin í 2021 er hin størsti, síðan Rúsdrekkasølan varð sett á stovn. Á talvuni niðanfyri sæst, at umsetningurin er væl hægri enn hini árini. Sølan í 2021 var 14,0 mió hægri enn í 2020 og góðar 18,2 mió hægri enn í 2019. Orsøkin til hesa hækking stavar í stóran mun COVID-19 og frá fólkatilflyting umframt, at samfelagsbúskapurin er sera góður.

Umsetningurin fyri seinastu árini sær soleiðis út:

| (1.000 kr.) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umsetningur | 159.792 | 145.745 | 141.513 | 135.991 | 133.161 | 127.438 | 125.766 | 119.286 | 118.800 | 120.140 |

*alva 3.1: Árligi umsetningurin, 2012-2021*

## 3.2 Sølugongdin gjøgnum árið

Mánaðarliga sølan er rættiliga skiftandi gjøgnum árið. Gongdin í mánaðarligu søluni í 2021 býtir seg áleið eins og árið fyri. Allir mánaðirnir vóru størri og merktir av Covid-19. Minst søla er vanliga í byrjanini av árinum, meðan summarsølan og sølan fram ímóti ársskiftinum vanliga er størri.

| (1.000 kr.) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Januar | 8.535 | 8.468 | 7.326 | 6.930 | 6.829 | 6.984 | 6.675 | 6.903 | 6.719 | 6.576 |
| Februar | 11.331 | 9.840 | 8.634 | 8.766 | 8.361 | 8.364 | 7.824 | 7.527 | 7.473 | 7.822 |
| Mars | 14.240 | 9.775 | 10.339 | 11.138 | 9.547 | 9.275 | 9.788 | 8.016 | 10.235 | 9.068 |
| Apríl | 11.024 | 9.564 | 10.727 | 9.537 | 10.218 | 10.025 | 9.220 | 8.883 | 7.859 | 9.301 |
| Mai | 13.389 | 12.479 | 12.775 | 12.710 | 11.526 | 10.763 | 10.433 | 10.295 | 10.887 | 10.814 |
| Juni | 13.416 | 12.964 | 12.931 | 12.582 | 12.450 | 11.557 | 11.299 | 10.477 | 11.210 | 10.949 |
| Juli | 19.080 | 17.967 | 15.853 | 15.315 | 14.403 | 14.775 | 14.558 | 14.332 | 13.054 | 13.844 |
| August | 11.823 | 9.860 | 12.425 | 11.429 | 10.597 | 9.830 | 9.709 | 9.406 | 9.499 | 9.025 |
| September | 11.967 | 10.481 | 9.527 | 9.310 | 10.191 | 9.432 | 8.901 | 8.298 | 8.006 | 7.955 |
| Oktober | 12.342 | 11.898 | 11.180 | 9.908 | 9.923 | 9.506 | 10.555 | 9.667 | 8.445 | 8.811 |
| November | 11.928 | 12.363 | 11.936 | 11.630 | 10.679 | 9.756 | 9.485 | 9.362 | 9.926 | 10.490 |
| Desember | 20.717 | 20.086 | 17.860 | 16.736 | 18.437 | 17.171 | 17.319 | 16.120 | 15.487 | 15.483 |
| **Íalt** | **159.792** | **145.745** | **141.513** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** |

*Talva 3.2: Umsetningurin fyri hvønn mánað, 2012-2021*

## 3.3 Rakstraravlopskravið

Kravið til avlop av rakstrinum varð í 2010 hækkað við útvið 50%, úr 11,848 mió. til 16,848 mió. Avlopskravið varð í 2018 lækkað við 800 tkr. ið vórðu latnar sum avsláttur til loyvishavarar og sostatt ikki høvdu nakað fíggjarligt árin á Rúsdrekkasøluna.

Ein framgongd í umsetninginum frá 2020 til 2021, kann vera ábending um, at rúsdrekkanýtslan í Føroyum er voksin. Hetta er tó grundað príshækkingar frá veitarum, umframt at viðskiftafólk hevur undir Covid-19 í størri mun hevur keypt innalands, umframt betri góðsku heldur enn størri nøgdir.

Í 2021 vaks umsetningurin við 14,0 mió. í mun til undanfarna árið og eydnaðist tað sostatt at røkka avlopskravinum, sum varð ásett í løgtingsins fíggjarlóg fyri 2021.

Kravið var kr. 16.048.000 aftaná rakstrarútreiðslur og útreiðslur til høli, starvsfólk og umsiting. Tá árið varð gjørt upp, gjørdist avlopið kr. 19.979.567, tvs. ein munur uppá 3.931.567 kr.

Talvan 3.3 niðanfyri vísir gongdina í avlopi og játtan hjá RSL í tíðarskeiðnum 2012-2021.

| (1.000 kr.) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Avlopskrav | 16.048 | 16.048 | 16.048 | 16.048 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 | 16.848 |
| Avlop | 19.980 | 16.352 | 16.058 | 16.063 | 16.951 | 16.732 | 16.856 | 16.650 | 16.856 | 16.849 |
| **Munir** | **3.932** | **304** | **10** | **15** | **103** | **-116** | **8** | **-198** | **8** | **1** |

*Talva 3.3: Avlop frá rakstrinum, 2012-2021*

# 4. Rúsdrekkasølan, nýtsla og hagtøl

Hesin parturin viðgerð hagtøl og vísutøl fyri søluna í 2021 samanborðin við níggju undanfarin ár. Eisini verða viðmerkingar gjørdar til einstøku talvurnar.

## 4.1 Umsetningurin, býttur út á deildir

| (1.000 kr.) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 64.320 | 62.219 | 52.928 | 50.930 | 51.401 | 52.665 | 53.980 | 54.200 | 53.925 | 54.841 |
| Klaksvík | 15.736 | 15.036 | 14.143 | 13.622 | 12.943 | 12.243 | 12.065 | 11.745 | 11.668 | 11.743 |
| Drelnes | 11.581 | 10.616 | 9.168 | 9.136 | 8.846 | 9.173 | 9.336 | 9.205 | 9.481 | 9.124 |
| Miðvágur | 8.269 | 7.906 | 7.155 | 6.970 | 6.897 | 6.517 | 6.740 | 6.960 | 6.874 | 6.961 |
| Sandur | 3.462 | 3.374 | 2.950 | 2.923 | 3.088 | 2.882 | 2.726 | 2.449 | 2.149 | 2.367 |
| Saltangará | 15.370 | 14.556 | 13.527 | 12.891 | 13.099 | 13.284 | 13.465 | 14.400 | 14.284 | 14.570 |
| Norðskáli | 7.725 | 8.861 | 7.452 | 7.193 | 6.797 | 6.136 | 3.848 | 0 | 0 | 0 |
| Vestmanna | 2.349 | 2.340 | 2.012 | 1.909 | 1.304 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ordrar o.a. | 30.981 | 20.838 | 32.177 | 30.417 | 28.786 | 24.538 | 23.606 | 20.327 | 20.419 | 20.534 |
| **Íalt** | **159.792** | **145.745** | **141.513** | **135.991** | **133.161** | **127.438** | **125.766** | **119.286** | **118.800** | **120.140** |

*Talva 4.1: Umsetningur, 2012-2021*

Talvu 4.1 omanfyri vísir, at umsetningurin hevur verið javnur í árunum undan 2021. Útvið helmingurin av umsetninginum í sølubúðum stavar frá deildini í Tórshavn. Nærum allar deildir hava selt meira í kr. enn undanfarna ár. Væl meira er eisini selt av bíleggingum (ordrum o.l.) á høðusgoymsluni á Hjalla.

| (Vísutal) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavn | 117 | 113 | 97 | 93 | 94 | 96 | 98 | 99 | 98 | 100 |
| Klaksvík | 134 | 123 | 123 | 116 | 110 | 104 | 103 | 100 | 99 | 100 |
| Drelnes | 127 | 96 | 96 | 100 | 97 | 101 | 102 | 101 | 104 | 100 |
| Miðvágur | 119 | 110 | 110 | 100 | 99 | 94 | 97 | 100 | 99 | 100 |
| Sandur | 146 | 124 | 124 | 123 | 130 | 122 | 115 | 103 | 91 | 100 |
| Saltangará | 105 | 94 | 94 | 88 | 90 | 91 | 92 | 99 | 98 | 100 |
| Norðskáli | 201 | 230 | 194 | 187 | 177 | 159 | 100 | - | - | - |
| Vestmanna | 180 | 179 | 154 | 146 | 100 | - | - | - | - | - |
| Ordrar o.a. | 151 | 114 | 114 | 148 | 140 | 119 | 115 | 99 | 99 | 100 |
| **Íalt** | **133** | **121** | **118** | **113** | **111** | **106** | **105** | **99** | **99** | **100** |

*Talva 4.2: Umsetningur, vísutøl 2012-2021*

Í talvu 4.2 eru vísutølini sett til 100 í 2012 og í 2021 er samlaða vísutalið 133 í mun til í 2012.

Tað er stórur vøkstur í deildunum í Klaksvík, Drelnesi og á Sandi í tíðarskeiðnum 2012-2021. Eisini er vøkstur í bíleggingum (ordrum o.l.) og er hetta orsakað av øktari tollfríari sølu. Bíleggingar verða vanliga avgreiddir gjøgnum høvuðsgoymsluna á Hjalla. Status quo er í umsetninginum í Tórshavn og í Saltangará meðan sølan á deildini í Miðvági er farin nakað fram. Eisini sæst at deildirnar við Norðskála og í Vestmanna eru í støðugari menning. Samanumtikið er sølan í kr. vaksin og liggur relativt stabil kring landið.

## 4.2 Sølugongd í litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.3 er sølan gjørd upp í litrum og býtt í vørubólkar. Eisini er sølan deild upp í innanlands sølu og tollfríari sølu. Nógv størsti parturin av søluni í litrum er øl. Síðani kemur vørubólkurin vín/cider og spiritus. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur.

| (Litrar) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **313.868** | **270.441** | **292.904** | **279.510** | **282.067** | **273.873** | **271.001** | **246.863** | **242.219** | **246.833** |
| *- Spiritus innanlands* | 266.813 | 233.317 | 221.779 | 206.971 | 208.903 | 205.159 | 201.846 | 191.510 | 192.252 | 200.028 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 47.055 | 37.125 | 71.125 | 72.540 | 73.164 | 68.714 | 69.155 | 55.353 | 49.967 | 46.805 |
| **Vín/cider** | **672.913** | **651.353** | **639.676** | **622.358** | **593.487** | **541.097** | **529.221** | **508.121** | **490.093** | **476.567** |
| *- Vín/cider innanlands* | 617.867 | 607.063 | 552.512 | 538.583 | 513.898 | 463.801 | 461.460 | 456.776 | 447.109 | 440.193 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 55.046 | 44.289 | 87.164 | 83.775 | 79.589 | 77.295 | 67.761 | 51.345 | 42.984 | 36.374 |
| **Heitvín** | **9.515** | **8.692** | **10.823** | **9.796** | **9.786** | **9.555** | **10.041** | **9.741** | **9.741** | **9.236** |
| *- Heitvín innanlands* | 7.796 | 7.240 | 8.293 | 7.318 | 7.579 | 7.648 | 8.323 | 8.079 | 8.699 | 8.232 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 1.719 | 1.452 | 2.531 | 2.478 | 2.207 | 1.907 | 1.718 | 1.662 | 1.042 | 1.004 |
| **Øl** | **1.281.792** | **1.249.245** | **1.181.942** | **1.166.007** | **1.142.219** | **1.086.767** | **1.060.514** | **1.025.672** | **980.493** | **1.036.304** |
| *- Øl innanlands* | 1.261.841 | 1.229.962 | 1.159.827 | 1.146.404 | 1.123.362 | 1.070.937 | 1.042.053 | 1.010.899 | 972.246 | 1.023.896 |
| *- Øl tollfrítt* | 19.952 | 19.282 | 22.114 | 19.603 | 18.858 | 15.830 | 18.461 | 14.773 | 8.247 | 12.408 |
| **Alkoholfrítt** | **6.562** | **5.945** | **5.740** | **4.023** | **3.900** | **2.268** | **1.200** | **776** | **928** | **1.401** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | 6.562 | 5.905 | 5.737 | 4.023 | 3.898 | 2.268 | 1.200 | 693 | 916 | 891 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | 0 | 40 | 3 | 0 | 2 | 0 | 0 | 83 | 12 | 510 |
| **Í alt** | **2.284.651** | **2.185.675** | **2.131.085** | **2.081.695** | **2.031.460** | **1.913.560** | **1.871.977** | **1.791.173** | **1.723.474** | **1.770.341** |
| *- Í alt innanlands* | 2.160.879 | 2.083.487 | 1.948.148 | 1.903.298 | 1.857.640 | 1.749.813 | 1.714.882 | 1.667.957 | 1.621.222 | 1.673.240 |
| *- Í alt tollfrítt* | 123.772 | 102.188 | 182.937 | 178.396 | 173.820 | 163.747 | 157.095 | 123.216 | 102.252 | 97.101 |

*Talva 4.3: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, 2012-2021*

| (Vísutal, litrar) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **127** | **110** | **119** | **113** | **114** | **111** | **110** | **100** | **98** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 133 | 117 | 111 | 103 | 104 | 103 | 101 | 96 | 96 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 101 | 79 | 152 | 155 | 156 | 147 | 148 | 118 | 107 | 100 |
| **Vín/cider** | **141** | **137** | **134** | **131** | **125** | **114** | **111** | **107** | **103** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 140 | 138 | 126 | 122 | 117 | 105 | 105 | 104 | 102 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 151 | 122 | 240 | 230 | 219 | 213 | 186 | 141 | 118 | 100 |
| **Heitvín** | **103** | **94** | **117** | **106** | **106** | **103** | **109** | **105** | **105** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 95 | 88 | 101 | 89 | 92 | 93 | 101 | 98 | 106 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 171 | 145 | 252 | 247 | 220 | 190 | 171 | 166 | 104 | 100 |
| **Øl** | **124** | **121** | **114** | **113** | **110** | **105** | **102** | **99** | **95** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 123 | 120 | 113 | 112 | 110 | 105 | 102 | 99 | 95 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 161 | 155 | 178 | 158 | 152 | 128 | 149 | 119 | 66 | 100 |
| **Alkoholfrítt** | **468** | **424** | **410** | **287** | **278** | **162** | **86** | **55** | **66** | **100** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | 736 | 663 | 644 | 452 | 437 | 255 | 135 | 78 | 103 | 100 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 100 |
| **Í alt** | **129** | **123** | **120** | **118** | **115** | **108** | **106** | **101** | **97** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 129 | 125 | 116 | 114 | 111 | 105 | 102 | 100 | 97 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 127 | 105 | 188 | 184 | 179 | 169 | 162 | 127 | 105 | 100 |

*Talva 4.4: Sølan í litrum í ymiskum bólkum, vísutøl 2012-2021*

Talva 4.4 vísur gongdina í litrum/vørubólkum, sum indekseraði tøl. Størsta afturgongdin sæst í tíðarskeiðnum 2012-2021 í vørubólkinum heitvín, innanlands, meðan størsta framgongdin í sama tíðarskeiði sæst í vørubólkinum vín/cider. Eisini er framgongd í søluni av øli og av alkoholfríum vørum. Hetta vísir greitt, at drekkimynstrið broytist soleiðis, at føroyingar nú keypa veikari sløg av rúsdrekka enn fyrr. Generelli mynstrið er tó at innanlands søla er jøvn og minkar, meðan tollfría sølan innan flest vørubólkar veksur.

## 4.3 Sølugongd í alkohol litrum býtt í vørubólkar

Í talvu 4.5 er sølan av rúsdrekkanøgdini umroknað til litrar av reinum alkoholi (alkohol litrar).

| (Alk. litrar) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **92.942** | **84.054** | **93.864** | **92.745** | **95.832** | **92.721** | **93.925** | **88.079** | **88.849** | **91.331** |
| *- Spiritus innanlands* | 75.170 | 70.096 | 67.664 | 65.885 | 68.649 | 67.449 | 68.563 | 67.688 | 70.140 | 73.527 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 17.773 | 13.957 | 26.201 | 26.860 | 27.182 | 25.382 | 25.362 | 20.391 | 18.709 | 17.804 |
| **Vín/cider** | **73.924** | **71.292** | **69.352** | **67.645** | **66.274** | **63.346** | **62.187** | **60.057** | **58.138** | **56.219** |
| *- Vín/cider innanlands* | 66.961 | 65.648 | 58.226 | 57.128 | 56.483 | 53.975 | 53.770 | 53.654 | 52.637 | 51.675 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 6.963 | 5.644 | 11.126 | 10.516 | 9.791 | 9.371 | 8.417 | 6.403 | 5.501 | 4.544 |
| **Heitvín** | **1.585** | **1.469** | **1.840** | **1.691** | **1.710** | **1.658** | **1.742** | **1.679** | **1.682** | **1.588** |
| *- Heitvín innanlands* | 1.306 | 1.227 | 1.435 | 1.273 | 1.337 | 1.334 | 1.452 | 1.408 | 1.516 | 1.424 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 279 | 242 | 404 | 418 | 374 | 324 | 290 | 271 | 166 | 164 |
| **Øl** | **70.702** | **68.903** | **64.817** | **64.025** | **62.946** | **59.397** | **57.547** | **55.142** | **52.435** | **54.923** |
| *- Øl innanlands* | 69.603 | 67.853 | 63.566 | 62.935 | 61.903 | 58.538 | 56.548 | 54.364 | 52.008 | 54.300 |
| *- Øl tollfrítt* | 1.099 | 1.050 | 1.251 | 1.090 | 1.043 | 859 | 999 | 778 | 427 | 623 |
| **Í alt** | **239.294** | **225.934** | **230.332** | **226.475** | **227.035** | **217.233** | **215.401** | **204.957** | **201.104** | **204.061** |
| *- Í alt innanlands* | 213.180 | 205.040 | 191.349 | 187.591 | 188.644 | 181.296 | 180.333 | 177.114 | 176.301 | 180.926 |
| *- Í alt tollfrítt* | 26.114 | 20.894 | 38.983 | 38.884 | 38.391 | 35.936 | 35.068 | 27.843 | 24.803 | 23.135 |

*Talva 4.5: Sølan, gjørd upp í alkohol litrum, 2012-2021*

Talvan vísur, at samlaðu alkohol litrarnir innanlands liggja javnt í tíðarskeiðnum 2012-2021, meðan tollfría sølan veksur. Árini 2020/2021 er merkt av Covid-19 – Meir er selt innanlands og minni selt tollfrítt. Samlað sæst, at sølan í alkohol litrum í tíðarskeiðnum 2012-2021 so at siga er vaksin saman við fólkatalinum.

| (Vísutal, alk.l.) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **102** | **92** | **103** | **102** | **105** | **102** | **103** | **96** | **97** | **100** |
| *- Spiritus innanlands* | 102 | 95 | 92 | 90 | 93 | 92 | 93 | 92 | 95 | 100 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 100 | 78 | 147 | 151 | 153 | 143 | 142 | 115 | 105 | 100 |
| **Vín/cider** | **131** | **127** | **123** | **120** | **118** | **113** | **111** | **107** | **103** | **100** |
| *- Vín/cider innanlands* | 130 | 127 | 113 | 111 | 109 | 104 | 104 | 104 | 102 | 100 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 153 | 124 | 245 | 231 | 215 | 206 | 185 | 141 | 121 | 100 |
| **Heitvín** | **100** | **93** | **116** | **106** | **108** | **104** | **110** | **106** | **106** | **100** |
| *- Heitvín innanlands* | 92 | 86 | 101 | 89 | 94 | 94 | 102 | 99 | 106 | 100 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 170 | 148 | 247 | 255 | 228 | 198 | 177 | 165 | 101 | 100 |
| **Øl** | **129** | **125** | **118** | **117** | **115** | **108** | **105** | **100** | **95** | **100** |
| *- Øl innanlands* | 128 | 125 | 117 | 116 | 114 | 108 | 104 | 100 | 96 | 100 |
| *- Øl tollfrítt* | 176 | 169 | 201 | 175 | 167 | 138 | 160 | 125 | 69 | 100 |
| **Í alt** | **117** | **111** | **113** | **111** | **111** | **106** | **106** | **100** | **99** | **100** |
| *- Í alt innanlands* | 118 | 113 | 106 | 104 | 104 | 100 | 100 | 98 | 97 | 100 |
| *- Í alt tollfrítt* | 113 | 90 | 169 | 168 | 166 | 155 | 152 | 120 | 107 | 100 |

*Talva 4.6: Sølan í alkohol litrum, vísutøl 2012-2021*

Talva 4.6 vísur, at vísutalið fyri søluna av alkohol litrum er støðugt. Bólkurin spiritus er minkaður rættuliga nógv - serstakliga innanlands um 2021 ikki verður tikið við. Alkohol litrarnir í vørubólkinum vín og cider umframt øl, eru einastu bólkarnir, har alkohol litrarnir eru markant fleiri, enn teir vóru í 2012.

## 4.4 Vøruúrvæl býtt í vørubólkar

Talva 4.7 niðanfyri vísir vøruúrvælið býtt í vørubólkar fyri tíðarskeiðið 2012-2021. Skilt millum tal á vørum seldar innanlands og vørur seldar tollfrítt, umframt at samlaða vøruúrvalið er víst.

| (Vøruúvæl. nøgd) | 2021 | 2020 | 2019 | 2018 | 2017 | 2016 | 2015 | 2014 | 2013 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Spiritus** | **1.430** | **1.209** | **1.277** | **1.187** | **1.057** | **890** | **840** | **771** | **541** | **536** |
| *- Spiritus innanlands* | 956 | 708 | 742 | 688 | 601 | 456 | 406 | 376 | 355 | 359 |
| *- Spiritus tollfrítt* | 474 | 501 | 535 | 499 | 456 | 434 | 434 | 395 | 186 | 177 |
| **Vín/cider** | **1.913** | **1.762** | **1.698** | **1.604** | **1.447** | **1.154** | **1.086** | **1.150** | **952** | **976** |
| *- Vín/cider innanlands* | 1.662 | 1.465 | 1.425 | 1.295 | 1.203 | 908 | 890 | 938 | 842 | 858 |
| *- Vín/cider tollfrítt* | 243 | 297 | 273 | 309 | 244 | 246 | 196 | 212 | 110 | 118 |
| **Heitvín** | **120** | **103** | **129** | **96** | **101** | **89** | **90** | **80** | **69** | **67** |
| *- Heitvín innanlands* | 92 | 76 | 101 | 71 | 75 | 62 | 68 | 60 | 54 | 52 |
| *- Heitvín tollfrítt* | 28 | 27 | 28 | 25 | 26 | 27 | 22 | 20 | 15 | 15 |
| **Øl** | **892** | **732** | **710** | **647** | **576** | **379** | **314** | **230** | **217** | **281** |
| *- Øl innanlands* | 833 | 680 | 664 | 606 | 537 | 339 | 269 | 187 | 182 | 238 |
| *- Øl tollfrítt* | 59 | 52 | 46 | 41 | 39 | 40 | 45 | 43 | 35 | 43 |
| **Alkoholfrítt** | **76** | **70** | **69** | **44** | **40** | **18** | **9** | **14** | **14** | **16** |
| *- Alkoholfrítt innanlands* | 76 | 69 | 66 | 44 | 39 | 18 | 9 | 10 | 11 | 11 |
| *- Alkoholfrítt tollfrítt* | 0 | 1 | 3 | 0 | 1 | 0 | 0 | 4 | 3 | 5 |
| **Í alt** | **4.431** | **3.866** | **3.883** | **3.578** | **3.221** | **2.530** | **2.339** | **2.245** | **1.793** | **1.916** |
| *- Í alt innanlands* | 3.619 | 2.998 | 2.998 | 2.704 | 2.455 | 1.783 | 1.642 | 1.571 | 1.444 | 1.548 |
| *- Í alt tollfrítt* | 812 | 868 | 885 | 874 | 766 | 747 | 697 | 674 | 349 | 368 |

*Talva 4.7: Vøruúrvæl býtt í vørubólkar, 2012-2021*

Nógv størsta vøruúrvalið er í vørubólkinum vín/cider. Síðani koma vørubólkarnir spiritus og øl. Minstu bólkarnir eru heitvín og alkoholfríar vørur. Samanumtikið seldi Rúsdrekkasølan 4.431 ymisk sløg av løgi í 2021 í mun til 1.589 sløg av løgi í 2008.

Vøruúrvælið og tænasta verða áhaldandi ment í mun til tað ið rørir seg uttanlands umframt í tráð við tað viðskiftafólk í Føroyum eftirspyrja. Mett verður at hesin vøkstur fer at halda fram komandi árini og krevur hetta meir av starvsfólkum okkara, sum tó fegin arbeiða áhaldandi við at menna vøruúrvælið og kundatænastuna til frama fyri føroyingin og viðskiftafólk okkara sum heild.

## 4.5 Fólkatal og gongdin í nýtslu pr. íbúgva

Talva 4.8 niðanfyri vísur í fyrstu linju talið av fólki í Føroyum í aldrinum 15 ár og eldri tann 1. januar árini 2012-2021.

| **Fólkatalið** | **2021** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðal 15 ár og eldri | 42.211 | 41.609 | 40.888 | 40.177 | 39.565 | 39.063 | 38.583 | 38.127 | 37.890 | 37.844 |
| Miðal tils. | 53.209 | 52.499 | 51.698 | 50.878 | 50.143 | 49.466 | 48.869 | 48.385 | 48.121 | 48.133 |
| **Nýtslan, alk.l. pr. íbúgva** | **2021** | **2020** | **2019** | **2018** | **2017** | **2016** | **2015** | **2014** | **2013** | **2012** |
| Alk.l./15 ár + (RSL) | 5,1 | 4,9 | 4,7 | 4,7 | 4,8 | 4,6 | 4,7 | 4,6 | 4,7 | 4,8 |
| Alk.l./15 ár + (Samlað í FO | 6,7 | 6,5 | 6,4 | 6,4 | 6,5 | 6,3 | 6,4 | 6,3 | 6,3 | 6,6 |
| Tollfrítt (Samlað í FO) | 1,2 | 0,9 | 1,6 | 1,5 | 1,4 | 1,3 | 1,2 | 1,0 | 0,9 | 0,8 |

*Talva 4.8: Fólkatalið, 15 ár og eldri, tann 1. Januar 2012-2021 og miðal sølan av alkohol litrum*

*Kelda: Hagstovan og egin útrokning*

Um sølan av alkohol litrum verður sett í mun til talið av íbúgvum, ið eru 15 ár og eldri, sæst at talið hevur verið støðugt. Í 2012 var talið 6,6 alkohol litrar, og er í 2021 6,7 alkohol litrar.

Afturat hesum tølum skal leggjast tað, sum verður selt tollfrítt og innflutt á annan hátt. Tað finnast ikki almenn hagtøl fyri hesa sølu. Tey tøl, sum síggjast niðast í Talvu 4.8 vísa tollfría vøru, seld gjøgnum RSL og føroysku bryggjaríini per. íbúgva 15 ár og eldri. Tað veruliga talið er óivað nakað hægri, tí her vantar tollfrít innflutt av ferðafólki við skipi og tollfrítt innflutt við ferðafólki, ið hevur keypt rúsdrekka uttanlands.

# 5. Ársroknskapur fyri 2020

Niðanfyri er ársroknskapurin hjá Rúsdrekkasølu Landsins fyri 2020 settur upp í mun til árið 2019. Roknskapurin fevnir um rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og notur.

## 5.1 Rakstrarroknskapur

| | Ár 2021 | Ár 2020 |
|---|---|---|
| Inntøkur: | | |
| Vørusøla | 159.792.396 | 145.744.999 |
| Vørunýtsla | -113.838.940 | -103.243.844 |
| Skiftisavlop | 45.953.456 | 42.501.156 |
| | | |
| Útreiðslur: | | |
| Starvsfólkakostnaður | 17.029.416 | 15.562.428 |
| Avskrivingar | 2.183.327 | 2.254.251 |
| Annar kostnaður | 8.081.726 | 8.172.333 |
| Útreiðslur íalt | 27.294.469 | 25.989.012 |
| | | |
| Úrslit áðrenn fíggjarpostar | 18.658.987 | 16.512.144 |
| Fíggjarpostar | 17.393 | 8.165 |
| Roknskaparligt avlop | 18.676.381 | 16.520.308 |

| **Avrokning av avlopi, ásett á fíggjarlógini** | | |
|---|---|---|
| Roknskaparligt avlop | 18.676.381 | 16.520.308 |
| Avskrivingar | 2.183.327 | 2.254.251 |
| Íløgur | -880.140 | -2.422.573 |
| Nettoavlop | 19.979.568 | 16.351.987 |
| Avlop, ásett á fíggjarlógini | 16.048.000 | 16.048.000 |
| Munur | 3.931.568 | 303.987 |

### 5.2 Fíggjarstøða

| | 31.12.2021 | 31.12.2020 |
|---|---|---|
| **OGN:** | | |
| Støðisogn | 3.226.935 | 4.530.122 |
| Vørugoymsla | 14.480.088 | 13.935.908 |
| Vøru- og tænastuáognogn | 690.195 | 664.682 |
| Onnur áogn | - | - |
| Tíðaravmarkingar | - | 921.042 |
| Tøkur peningur | 3.542.168 | 3.764.111 |
| Ogn tilsamans | 21.939.385 | 23.815.865 |
| | | |
| **SKULD:** | | |
| Eginogn | 3.226.935 | 4.530.122 |
| Vøru- og tænastuskuld | 1.665.271 | 4.305.842 |
| Onnur skuld | - | - |
| Millumrokning við Gjaldstovuna | 10.981.275 | 9.237.310 |
| Tíðaravmarkingar | 4.936.426 | 4.115.209 |
| Meirviriðisgjald | 1.129.479 | 1.627.382 |
| Skuld íalt | 18.712.451 | 19.285.743 |
| Eginogn og skuld tilsamans | 21.939.386 | 23.815.865 |
| | | |
| Leasingskyldur | - | - |
| Leiguskyldur pr. ár pr. 31.12. | 7.106.601 | 6.221.900 |